


# Hans Edward í Heita Stólinum

**Hans Edward, forsangarin í The Dreams greiður frá einum heldur ókendum parti av lívið sínum í samrøðu við Sosialin.**

Hans Edward og The Dreams hava seinastu tíðina skapt sær góða undirtøku millum fólk, og teir ungi føroyingarnir hava veruliga sett síni spor í tónleiki heimin í Føroyum og uttanlands. Sosialurin hevur eina samrøðu við Hans Edward, har hann greiður frá einum heldur ókendum parti av lívið sínum.

**1. Hvussu ofta hyggur tú eftir porno?**
*- Seinast eg hugdi eftir porno var tá eg gekk á Bakarskúla í Danmark. Danir hava ein løgnan vana tá tað kemur til porno, og tað bleiv eg ræettiliga bilsin av. Teir sita fleiri undir somu dýnu meðan teir hyggja eftir porno. Tað havi eg so ikki gjørt, sigur Hans Edward við einum smíli.*

**2. Kennir tú teg nakrantíð einsaman?**
*- Um eg bleiv spurdur um hatta fyri einum hálvum árið síðani hevði eg sagt ja, men nú er daman hjá mær flutt til Danmarkar eisini, so nú kenni eg meg ikki einsaman longur.*

**3. Hvørjum tónleikarar hevur tú mest virðing fyri?**
*- Eyðun Nolsøe. Hann hevur altíð spælt framúrskarandi góðan tónleik.*

**4. Hvørjum tónleikara hevur tú minst virðing fyri?**
*- Gestum. Eg haldi teir eru yvirfladiskir, og keðiligur persónar.*

**5. Hvør er besta uppliving tú hevur havt í tínum tónleika lívið?**
*- Tað stendur millum tríggjar ymsar festivalar. Summarfestivalurin var ótrúligur, umframt Skanderborg Festivalurin og tá vit spældu í London.*

**6. Hevur tú nakrantíð tikið rúsevnir?**
*- Eg havi roynt hassj tá eg var 18 ár, men tað eri eg givin við.*

**7. Hevur tú nakrantíð brotið lógina?**
*- Vit stjólu ræðuliga illa tá vit vóru ungir, men tað var mest góðgæti o.s.fr. Men einki meira álvarsamt enn tað.*

**8. Hvat er tað mest flóvisliga tú hevur uppliva í tínum tónleika lívið?**
*- Eg datt av einaferð undir einari konsert hjá okkum tá vit vóru umleið 14 ár. Tað var ikki flóvisligt tá, men eg hevði tað ikki so gott dagin eftir tá eg var vorðin edrúur.*

**9. Nær koma tit aftur at spæla í Føroyum?**
*- Vit spæla fyrstu ferð aftur í Føroyum á Festivalinum við Múrin, sigur Hans Edward at enda.*

## Eivør fram-førur í Hawaii

Í hesum døgum ferðast føroyska Eivør Pállsdóttir runt í Hawaii, har hon millum annað skal framføra við ymsum lokalum tónleikarum.

Eivør hevur seinastu árini verið í tættum samstarvið við eysturríkska Villu Veski, og tað er orsaka av hesum samstarvið at Eivør nú skal framføra í Hawaii fyri aðru ferð. Fyri okkurt um fýra árum síðani vóru Eivør og Villu eisini í Hawaii, og tað er sama leið tey leggja hesu ferð. Ætlanin er at framføra tríggjar ferðir, og verður tað somu støð ið tey vitjaðu fyri fýra árum síðani.

Eivør og Villu búgva í einari hyttu í Hawaii, og hóast tey bert skulu framføra tíggjar ferðir, so steðga tey á í Hawaii í heilar 10 dagar. Orsøkin til hetta er at Eivør hevur ætlanir um at fáa nýggja inspiratión frá sínum samstarvsfelaga, og ikki minst frá tí vakra umhvørvinum í Hawaii, og vónandi verður okkurt nýtt tilfar at sýna fram, tá Eivør aftur leitar sær heim til klettarnar..